VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen greiðir frá um veðrið



Veðrið í morgin:
Gul til stívt andøvsgul av eystri, seinnapartin upp í ein strúk. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 9 og 12 stig.



Veðrið hósdagin:
Gul til stívt andøvsgul av eystri og landnyrðingi og regn eitt skifti. Hitin millum 7 og 10 stig.



Veðrið fríggjadagin:
Lot til andøvsgul av eystri og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 8 og 11 stig.

Veðrið leygardagin og sunnudagin:
Lot til andøvsgul av ymsum ættum, sunnudagin av norði. Ælingur, men eisini sólglottar og hitin millum 9 og 13 stig.

Summarsól-støður í Sandágerði

»Havnin skal verða heimsins reinasti høvuðsstaður, Sandágerð skal verða millum reinastu baðistrendur, og kommunan skal brúka varandi orku«.

Ætlarnirnar hja Tórshavnar kommunu feila onki, sambært forkvinnuni í Heilsunevndini, Elin Lindenskov, sum eigur frammanfyri nevndu útsøgn, ið hon kom við í røðu síni í Sandágerði, tá summarsólstøður varð hildið í gjárkvøldið í sambandi við longsta dag.

Og nógv bendir á, at Elin Lindenskov og býráðið hava nóg mikið at fara í gongd við, um vit blaða aftur á síðu 22 og 23 í dagsins blað.

Tiltakið í Sandágerði í gjárkvøldið byrjaði klokkan 21 við báli, sangi og føroyskum dansi. Ársins longsti dagur vísti seg frá síni allar bestu síðu, og rættiliga fitt av fólki var komið í Sandágerð, har møguleiki var at ríða á pony og hita seg við kakao við bollum afturvið.

Eftir røður og sang varð aftur farið upp á gólv – ella rættari oman á sand at dansa.

-kmi

Aftur í ár var stórt bál kynt í Sandágerði í sambandi við summarsólstøður
Mynd: Kári Mikkelsen

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	15
Nuuk	3
Qaqortoq	2
Ammassalik	9
Saint John's	--
Halifax	--
Reykjavík	12
Seyðisfjørður	8
Tórshavn	13
Lerwick	12
Aberdeen	23
London	24
Tromsø	--
Bergen	15
Oslo	--
Stokkhólm	21
Keypmannah.	21
Helsinki	12
Moskva	10
Berlin	27
Warzawa	28
Kiev	25
Bukarest	24
Paris	26
Madrid	13
Róm	22
Malorca	21
Athen	25
Malta	25
Tunis	25
Beijing	29
New Dehli	34
Bangkok	34
Jakarta	32
Sydney	16
New York	35
Miami	28
Los Angeles	19
Meksikobýur	19
Panama	--
La Paz	12
Rio de Janeiro	--
Buenos Aires	10

LUFTTRÝSTIÐ



Í gjár:
Eitt hátrýst, 1021 hPa. yvir sunnara Norðsjógvin fer eystureftir og ein hátrýstryggur til havið vestan fyri Føroyar fer í landnyrðing.

Í dag:
Eitt lágtrýst, 993 hPa. vestan fyri Írland kemur spakuliga hendavegin og brúgvalagið haðani verður við Føroyar hósnáttina.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 09/06 kl. 06^{00} – 10/06 06^{00}. Hitin í gjár: 10,7°
Minsti hiti máldur í juni: -9,9° - Mesti hiti máldur í juni: 18,3°

AVFALLIÐ



Avfallið: 2,0 mm – mált frá 09/06 kl. 06^{00} – 10/06 06^{00}.
Avfallið higartil í juni: 21 mm

Lesið Sosialin

VESTFALLSKYRRINDI

16. juni	Mánin longst frá jørðini
18. juni	Fullmáni
26. juni	Seinna kvarter
1. juli	Mánin næstur jørðini

Kelda: Almanakkin 2008

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	Suðuroyar-/Vágafirði sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	Hestfirði/Sundalagnum sp.	Vestmanna-sundi fp.	Vestmanna-sundi sp.	Mykines-firði fp.	Mykines-firði sp.	Nólsoyar-firði fp.	Nólsoyar-firði sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði sp.	Hvanna-sundi fp.	Hvanna-sundi sp.	Fugloyar-firði fp.	Fugloyar-firði sp.
24. juni	11:29	23:48	10:29	22:48	10:44	23:03	1:10	13:29	2:10	14:29	9:44	22:03	8:44	21:03	11:44	-	0:25	12:44	11:14	23:33	0:10	12:29
25. juni	-	12:07	11:07	23:40	11:22	23:55	1:48	14:07	2:48	15:07	10:22	22:55	9:22	21:55	0:03	12:22	1:03	13:22	11:52	-	0:48	13:07
26. juni	0:40	13:14	-	12:14	-	12:29	2:40	15:14	3:40	16:14	11:29	-	10:29	23:04	0:55	13:29	1:55	14:29	0:25	12:59	1:40	14:14
27. juni	1:49	14:24	0:49	13:24	1:04	13:39	3:49	16:24	4:49	17:24	0:04	12:39	11:39	-	2:04	14:39	3:04	15:39	1:34	14:09	2:49	15:24
28. juni	2:47	15:10	1:47	14:10	2:02	14:25	4:47	17:10	5:47	18:10	1:02	13:25	0:02	12:25	3:02	15:25	4:02	16:25	2:32	14:55	3:47	16:10